# Skálafjarðartunnilin gevur stórar møguleikar

JÓGVAN OLSEN
havnemand@kallnet.fo

Byggingin av ætlaða Skálafjarðartunlinum er eitt høvi at fáa umhvørvi og trivnað inn sum ein part av samferðslupolitikkinum. Ein so stór broyting av undirstøðukervinum kann gagnnýtast til eina broyting av ferðslumynstrinum sum heild.

Verður hesin møguleikin ikki troyttur, kunnu politikkararnir ikki siga seg vera sinnaðar at gera nakað fyri umhvørvið og trivnaðin.

Skálafjarðartunnilin fær eina øðrvísi ávirkan á samferðsluna, enn teir báðir fyrstu undirsjóvartunlarnir. Sjálvt um hann styttir um teinin hjá mongum, fer hann kortini í longdini at føra til meira bilkoyring.

Tunlar, sum Vága- og Klaksvíkstunlarnir, fáa koyringina at eksplodera frá degi til dags; bæði tí, at nógv meira flutningur – neyðugur og óneyðugur – fer fram, og tí at flutningurin verður skiftur frá kollektivari til individuella ferðslu. Skálafjarðartunnilin skal gerast millum tveir landspartar, sum tað longu er koyrandi millum. Tað fer helst ikki at minka um talið av ferðafólkum í bussunum millum landspartarnar, men tað vera lutfalsliga færri fólk, sum ferðast við bussi í mun til við bili.

Avleiðingin verður sostatt tann, at bilkoyringin fer at vaksa av hesum tunlinum, um hann verður gjørdur sambært vanahugsanini, sum stýrur samferðslupolitikkinum. Tað vera enn fleiri, sum fara at arbeiða í Havn og búgva í Eysturoynni. Aðrir eysturoyingar fara líka at gera sær eitt ørindi í Bónus ella Skemmuna. Havnarfólk kunnu líka gera sær eitt rend til Klaksvíkar.

Fyri hvønn túrin vera væl í meðal brendir tríggir-fýra litrar av fossilum brennievni – hesir geva um átta kilo av $CO_2$ til vakstrarhúseffektina. Um tunnilin skal bera seg fíggjarliga fer at vera neyðugt at tryggja, at fólk koyra meira heldur enn minni. Fólkini aftan fyri verkætlanina hava tíbetur eisini viðgingið, at hetta skaðaárinið er íroknað.

Fyri hvønn undirsjóvartunnil og hvørt vegasamband verður føroyingurin meira bundin at bilinum. Tá skip eru ein partur av samferðsluni, hevur kollektiv ferðsla fyrimunin. Tá ferðslan er kollektiv, fer ikki so nógv óneyðug ferðsla fram.

Orsakað av øktari ferðslu og sterkari bilbundni í samfelagnum sum heild, fer bilplágan sostatt at vaksa av hesum tunlinum, heldur enn at minka.

**Bilar, bygdir og býir**

Verður tunnilin bygdur, skulu 3.000 fleiri bilar inn í Havnina hvønn dag. Seinni 6.000. Seinni 12.000?

Bilferðslan skræðir býin sundur. Stóru vegirnir eru sum álir av ídnaðarøki, har menniskjan má laga seg undir maskinunum. Flestastaðni í býnum kunnu sjónveik og onnur brekaði ikki ferðast sjálvi meira enn kanska hundrað metrar. Ikki er hugsandi at loyva børnum í nánd av hesum vegum, hóast teir eru mitt í okkara býi. Sama er galdandi í bygdunum.

Lokala býarlívið og bygdarlívið er nógv avmarkað av bilferðsluni. Nógvi gangurin ger tað óunniligt at vera úti. Børn kunnu ikki sjálvi fara til aktivitetir. Handlar og annað "publikums-orienterað" virksemi flytur saman í stórar eindir, burtur frá lokalsamfelagnum.

Eintáttaða menningin av bilferðsluni er serliga skaðilig fyri tey, ið ikki hava bil. Hesi vera nógv skerd í gerandisdegnum av tí, at alt verður skipað kring bilin.

## $CO_2$-útlátið

Føroyingar eru millum tey fólk í heiminum, sum mest eldhugaði elva til alheims upphitingina. Ongin veit fyri vist, hvørjar avleiðingar upphitingin fær. Men tað er vist, at tað er næstan bara amerikanarum, vit eru samd við um at halda, at "onki veruligt eigur at vera gjørt við trupulleikan".

Árinini frá veðurlagsbroytingunum eru týðilig, sjálvt um ongin kann prógva ítøkiliga, at orsøkin er $CO_2$. Tað man ikki vera vert at satsa uppá, at tað ikki er $CO_2$, sum er orsøkin. Kopernikus fekk heldur ikki prógvað ítøkiliga, at gongustjørnurnar ganga í ringrás um Sólina.

Tað er sannlíkt, at neyðugt verður at gera okkurt við trupulleikan. Tess longur, tað verður bíðað, tess truplari verður tað at taka hesi stig. Um tað verður gjørt nú, kunnu vit í ávísan mun lata tað koma sum ein part av samfelagsmenningini. Bíða vit til seinni, verður tað meira neyðugt við løgnum atgerðum fyri at minka útlátið.

Vit hava vitað í nógv ár, at $CO_2$-ið er ein trupulleiki, men hvat er gjørt við tað? Nú er tað satt at siga ein desperat støða. Tann einasti ábyrgdarfulli umhvørvispolitikkurin vildi verið at satsa uppá at klára seg púra uttan fossil brennievni til dømis í 2015.

**Tekniskar loysnir?**

Summi halda kanska, at bilar, sum koyra longri uppá liturin, fara at loysa trupulleikan. Tað fara teir ikki, tíverri. Um bilarnir kundu koyrt 100 km uppá liturin, hevði tað verið ein tolulig fyribilsloysn. Tað skal skiljast soleiðis: um bilarnir koyrdu sjey ferðir longri uppá liturin, kundu vit sett ferðina, sum vit minka $CO_2$-útlátið við, niður til ein sjeyndapart. Hetta er eitt einfalt roknistykki, og samanumtikið er alt rættiliga einfalt: Tað finst bara ein loysn, og tað er at gevast at brenna fossil brennievni. Fyrr ella seinni noyðast vit, og jú longur vit bíða, jú truplari verður tað. Og jú størri verður umhvørvisskaðin.

Onki undur fer at henda, sum kann loysa $CO_2$-trupulleikan, um orkunýtslan framhaldandi sleppur at vaksa. Um vit skulu loysa $CO_2$-trupulleikan, verður neyðugt at spara uppá orkuna. Bilar brúka dupult so nógva orka fyri hvørt fólkið sum bussar. Sostatt er kollektivur flutningur neyðugur.

Eftir øllum at døma verður orku- og $CO_2$-trupulleikin útsettur til komandi ættarlið at loysa. Skal eg veruliga noyðast at siga við sonin: "Nei, lítli mín, vit hugsaðu ikki um framtíð tína"?

**Til gagns fyri hvønn?**

Tá tað verður roknað út, at tað kann loysa seg vinnuliga at byggja tunnil, er tað tí, at meira ferðsla skal ganga millum Eysturoynna og Havnina, enn tað longu ger. Fyri at fáa ríkiligt av ferðslu vera tiltøk gjørd, at fáa fólk at koyra meira, enn tey veruliga hava tørv á. Er hetta ábyrgdarfullur politikkur – at lata vinnuvirksemi fara fram, har virksemið hongur natúrliga saman við tí at vaksa um $CO_2$-útlátið og bilpláguna?

Tað hevur verið sagt, at hesin tunnilin verður ein samferðslulig kollvelting. Tann størsta, enntá. Um hetta rættiliga skal vera ein kollvelting, má øll verkætlanin skipast soleiðis, at hon er við til at fáa fleiri ferðandi yvir í kollektiva ferðslu. Sum nú er, snýr menningin av samferðsluni seg um at økja bilatalið. Til skaða fyri umhvørvið og til skaða fyri býar- og bygdarlívið – serliga hjá børnum og øðrum veikum bólkum.

**Gylti møguleikin**

Landstýrið eigur ikki at loyva eini slíkari verkætlan at fara í gongd, uttan at seta inn eina mekanismu til at tryggja, at ein størri partur av øllum ferðandi ferðast við bussi. Talið av ferðandi við bussum skal ikki bara vera størri enn tað er nú, men ein størri prosentpartur av tí samlaða talinum av ferðandi. Annars hava tey fólkavaldu spilt okkum møguleikan at lata eina loysn uppá bilskaptu trupulleikarnar koma sum ein natúrligan part av samfelagsmenningini.

Sjálvandi má ein slík mekanisma vera so smidlig, at hon kann lagast eftir tí kunnleika og tøkni, sum framtíðin hevur at bjóða. Hinvegin má hon ikki vera so smidlig, at hon bara blívur eitt eiti.

Um ongin kann finna ein snøggari hátt, má tað bara setast sum ein treyt til tey, ið ynskja at byggja tunnil. Treytin kann t.d. ljóða soleiðis: "Helvtin av øllum ferðandi gjøgnum tunnilin skulu ferðast í bussi." Síðan má leiðslan av tunlinum tryggja, at tað verður soleiðis, gjøgnum lýsingarherferðir, príspolitikk ella annað. Hetta er eitt uppskot.

Um tað onkursvegna verður tryggjað, at lutfalsliga fleiri brúka kollektivan flutning gjøgnum Skálafjarðartunnilin, fer tað at ávirka ferðsluna í restini av landinum positivt.

Tað, sum er uppá spæl, er møguleikin fyri at gera ein umhvørvisvinarligan samferðslupolitikk í staðin fyri tann vanliga, ið bert snýr seg um at vaksa um bilkoyringina.

# At vera løgtingslimur

EILIF SAMUELSEN



Eitt av teimum grundleggjandi meginsjónarmiðunum í parlamentarisku skipanini er, at teir valdu tinglimirnir taka seg saman í flokkar. Í Danmarks Riges Grundlov stendur einki um politiskar flokkar, tí tað eru teir einstøku valdu persónarnir, sum hava mandatini, tvs, sum hava fingið heimildina frá sínum veljarum at umboða teir á tingi. Men tinglimirnir eru kortini suverenir, tað vil siga, at teir einans eru bundnir av síni sannføring og ikki av nakrari forskrift frá sínum veljarum (§56). At grundlógin framvegis hevur tað sjónarmiðið, at tað eru einstaklingar, sum hava fingið álitið frá veljarunum, gongur eisini fram av §41, stk. 1, sum gevur einum og hvørjum limi í tinginum rætt til at leggja fram lógaruppskot og uppskot til samtyktar.

Kortini hevur gongdin verið tann, at hóast tinglimirnir í fyrstani í prinsippinum vóru leysir av flokkum, so eru teir í dag allir stillaðir upp á listar og eru valdir gjøgnum politiskar flokkar. Allir tinglimir síggja seg sjálvar og hinar tinglimirnar fyrst og fremst sum umboð fyri ein politiskan flokk, sum hevur eina politiska stevnuskrá. Tað kann ofta koma einum nývaldum óvart á, hvat tað í grundini ber í sær at verða valdur á ting fyri ein politiskan flokk og gerast limur í einum tingbólki. Tá verður ein við hvørt noyddur at boyggja seg at tí felags viljanum. Á tingi snýr tað seg nógv um at gera meirilutar, og harvið kemur ein út í politiskt stríð við umboð fyri aðrar flokkar. Men vanliga er samarbeiðið millum starvsfelagar rættiliga gott. Ein skilir og virðir í høvuðsheitum politisku sjónarmiðini hjá hinum, og vanliga verða óskrivaðar spælireglur virdar, t.d. at gjørdar avtalur verða hildnar.

Eitt eru tær politisku ósemjurnar við limir úr øðrum politiskum flokkum, men ofta eru teir størstu trupulleikarnir innanfloks, í egnu tingmanningini. Teir einstøku tinglimirnir skulu í samarbeiði við hini av manningini og ofta í kapping royna at gera vart við seg og koma sær fram, og tá kunnu neistar fúka.

Tað vanliga er, at tá ið ein tinglimur er valdur á ting, so er hann tað eina og aleina tí, at flokkurin hevur stillað hann upp á sín lista. Tí verður væntað av honum ella henni, at tey eru loyal móti tingbólkinum og vísa tað, ið kallað verður floksdisciplin. Tað sigur seg sjálvt, at fyri floksins arbeiði í tinginum hevur tað stóran týdning og eisini fyri trúvirðið úteftir, at tingmanningin stendur samd. Floksformaðurin má, serliga tá flokkurin er í samgongu, hava eina rímiliga vissu fyri, at hann hevur allan flokkin við sær, tá ið atkvøðast skal. Um ein tinglimur ikki heldur seg kunna tað, má hann í góðari tíð týðiliga siga frá tí á einum innanhýsis floksfundi og annars ikki gera málið til eitt evni fyri fjølmiðlarnar.

**Samhald**

Sambandsflokkurin hevur gjøgnum tíðirnar sett eina æru í, at flokkurin úteftir stendur samdur. Tað merkir ikki, at teir einstøku tinglimirnir altíð eru samdir um øll mál, men vanligt hevur verið, at ymisk sjónarmið og ymiskar áskoðanir til ávís mál hava verið umrødd út í æsir innanhýsis, inntil málið er avklárað soleiðis, at flokkurin er komin til eina felags støðu, t.v.s. at einstakir tinglimir í tingsalinum vanliga atkvøða saman við tingmanning floksins. Tað er helst eisini so, at tann eyðmjúka floksættarkenslan mundi vera sterkari fyrr, enn hon hevur verið nú í nýggjari tíð. Tí síggjast kanska fleiri ganga solo.

Eitt av meginsjónarmiðunum hjá Sambandsflokkinum hevur altíð verið, at tá ið ræður um mál av etiskum og moralskum slag, so verður sæð burtur frá óskrivaða kravboðnum um, at flokkurin við atkvøðugreiðslur í høvuðsheitum eigur at vera samdur, men latið verður yvir til tann einstaka tinglimin at atkvøða eftir síni persónligu sannføring.

Hetta er ein greið og rímilig skipan, sum tekur fyrilit fyri samvitskuni hjá tí einstaka. Tað kravið, sum hevur verið reist í seinastuni, at flokkurin eisini í slíkum málum skal hava eina felags støðu, er púra burturvið. Í slíkum førum skal tann einstaki svara fyri sína egnu samvitsku og sannføring, og ta avgerðina eiga øll sjálvandi at virða – bæði tey, sum eru fyri og tey, sum eru ímóti. Tann, sum ikki virðir støðutakanina hjá øðrum, má sigast at vera demokratiskt ignorantur. Í øllum atkvøðugreiðslum er møguleikin fyri, at nøkur vera við undirlutan, ikki fáa sín vilja framdan, og tann tinglimur, sum ikki kann góðtaka at verða niðurstemmaður í einum máli, hevur misskilt, hvat ið demokrati er.

**Átrúni og politikkur**

Seinastu tíðina hevur átrúnaður meira og meira verið vavdur upp í tað politiska arbeiðið á løgtingi. Hetta byrjaði mitt í áttatiárunum, tá ið summi fóru at misbrúka kristindómin á tingi fyri at vinna sær politiskar atkvøður, heldur enn at brúka hann í kirkjum og í samkomuhúsunum.

Eisini í Sambandsflokkinum hava gjøgnum tíðirnar verið nógvir tingmenn, sum hava verið ídnir orðsins tænarar í samkomuhúsum, men tað hevur verið eyðkent fyri teir gomlu, at teir blandaðu ongantíð kristindómin saman við politikkinum á tingi, teir skildu ímillum, hvat ið Guds var og hvat ið keisarans var. Tað mesta, hesi nýggju fólkini, sum hava sett kristindómin í system fyri at vinna sær atkvøður, hava fingið burtur úr, er, at fleiri og fleiri fólk venda kristindóminum baki, ikki so nógv tí at tey hava nakað ímóti kristindóminum, men tí tey síggja, at hesir politikararnir kyniskt brúka kristindómin sum skálkaskjól fyri at bjarga sær sjálvum atkvøður.

Kristnin vinnur einki við at verða blandað upp í politikk, tað mundi eisini vera tí, at tríggir av evangelistunum siga søguna um Skattapengingin, har tað verður gjørt greitt, at tað verðsliga og tað andaliga eru hvørt sítt.